


# Vinnumenning

## – er tað tú?

Vilt tú vera við til at bera verandi vinnu framá og at fáa nýggjar spýrar at vaksa? Megnar tú bæði at arbeiða breitt og fara í dýbdina, tá tað er neyðugt? Klárar tú at hava fleiri bóltar í luftini í senn og halda høvdið kalt? Vilt tú arbeiða í einum toymi? So hava vit starvið til tín! Vinnuhúsið søkir eftir samskipara at arbeiða við vinnumálum.

**Arbeiðið fevnir um vinnuviðurskiftir í breiðum høpi. Tú fert at:**
- ráðgeva føroyskum fyritøkum
- gera lýsingar av málum, kanningar og frágreiðingar
- luttaka í arbeiðsbólkum og nevndum, sum viðgera vinnuviðurskiftir og vinnukarmar
- viðgera lógir og kunngerðir, sum ávirka vinnuna
- røkja málsviðgerð og skrivarauppgávur fyri nevndir í vinnufeløgunum
- vera við í fyriskipan av vinnuligum tiltøkum og átøkum

Í hesum sambandi krevst tætt samskifti við føroyska vinnu og samskifti við myndugleikar.

**Vit vænta, at tú**
- hevur hóskandi hægri útbúgving og arbeiðsroyndir
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst
- hevur góð samstarvsevni
- dugir væl at samskifta, bæði á føroyskum, norðurlendskum og enskum.
- er fleksibul og kanst taka tøk, har tað er neyðugt

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur kunnleika til føroyska vinnu.

Vit kunnu lova tær eitt fjølbroytt og áhugavert starv í einum mennandi arbeiðsumhvørvi. Løn eftir avtalu.

Skrivlig umsókn, merkt "**Starv**", eigur at vera okkum í hendi í seinasta lagi **10. januar 2008**. Ynskir tú at vita meira, ert tú vælkomin at ringja til stjóran, **Maritu Rasmussen**, **tlf. 30 99 00**.

Umsóknirnar verða viðgjørdar í trúnaði.

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**
**Vinnuhúsið**
**Postsmoga 1038, FO-110 Tórshavn**

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

Smærugøta 9A
FO-100 Tórshavn
Tel: +298 30 99 00
Fax: +298 30 99 01
industry@industry.fo

Vinnuhúsið er felags heiti fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Handverksmeistarafelag og føroysku vinnufeløgini.
Feløgini í Vinnuhúsinum arbeiða fyri at tryggja føroysku vinnuni best møguligu kor. Hetta verður gjørt m.a. við miðvísum arbeiði og við kunning, sum kann geva politiska ávirkan.
Feløgini taka sær m.a. av sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum, veita limunum kunning og ráðgeving og skipa fyri vinnumennandi tiltøkum, sí eisini www.industry.fo